# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Marjóna Djurhuus, Tórshavn

## 35 ára starvsdag hjá Pf. Leif Mohr



1. mars 2005 hevði Marjóna Djurhuus 35 ára starvsdag hjá Pf. Leif Mohr.

Marjóna hevur øll hesi árini arbeitt sum skrivstovukvinna. Áðrenn hon byrjaði hjá Leif Mohr, hevði hon arbeitt hjá Grønlandsfelagnum og í handlinum hjá Niels Vang í Lucas Debesargøtu.

Marjóna er 55 ára gomul og ættað úr Porkeri, dóttir Símun og Rebekku Djurhuus. Tey eru 4 systkin: Poula, Marjóna, Oddný og Steingrím.

Marjóna er fødd og uppvaksin í Porkeri. Í 1964, tá Marjóna var 15 ár, flutti familjan til Havnar at búgva. Fyrst búði tey í Dr. Jakobsensgøtu, men nøkur ár seinni fluttu tey út á Suðuroyarveg.

Í frítíðini fæst Marjóna nógv við hondarbeiði. Hon hevur stóran áhuga í arbeiðinum í Missiónshúsinum, umframt at hon er aktiv í felagsskapinum Skandinavisk barnamissión.

Marjóna hevur nógvar dygdir. Hóast sera lítillátin, ger hon altíð sítt arbeiði til lítar. Tey sum dagliga starvast saman við henni, hava frá henni lært týdningin av góðsku og ordan í arbeiðinum. Við 35 ára royndum er hon eisini ein sera góður stuðul hjá lærlingum, starvsfelagum og leiðsluni. Marjóna hevur eisini eitt stórt hjarta og er altíð til reiðar at hjálpa, har tað er neyðugt.

### Rætting

Í nekrologinum um Atla P. Dam týsdagin er ein villa av misgáum komin inn í brotið »Eftirmæli, eftirviðgerð og eftirbilsni« um ***fólkafylkingina.*** Har skal standa um hana, at hon var ein ***seinpubertil*** semikommunistisk háskúlafløkja!

Vit biðja høvundan um umbering.

### Dagurin

**2. mars. Húngunn**, deyð ár 1003. Føroysk eftirgerð av týska navninum Kunigunde og varð skrivað Kunigunn, tá ið álmanakkin kom á føroyskum. Hon varð gift týska keisaranum Heindrikki II og læt byggja bæði kleystur og kirkjur. Navnið merkir *mæt stríðskvinna.*

### 85 ára føðingardagur



Týsdagin 8. mars verður Beata í Dali, Tórshavn, fødd Mørkøre, 85 ár.

Dagurin verður hildin hjá soninum á Onnugøtu 18, Hoyvík.

Berg Vatnhamar, Leirvík:

## 25 ára starvsdag hjá Pf. Leif Mohr



25. februar 2005 hevði Berg Vatnhamar 25 ára starsvdag hjá Pf. Leif Mohr/Pf. LM Electric.

Berg starvast sum verkstaðsleiðari hjá LM Electric. Tey fyrstu árini starvaðist Berg á goymsluni, men fór seinni í læru sum goymslu- og handilslærlingur. Àðrenn hann byrjaði hjá Leif Mohr, hevði hann fingist við ymiskt fyrifallandi arbeiði.

Berg er 45 ára gamal og ættaður úr Leirvík, sonur Arna og Ninnu Vatnhamar. Tey eru 8 systkin: Óla Jákup, Absalon, Miriam, Arnborg, Andrias, Sólmay, Berg og Eyðvør.

Berg er føddur og uppvaksin í Leivík, men tá hann var 8 ára gamal flutti familian til Havnar. Hann búði í Havn, til hann varð liðugur við skúlan í 1976. Síðan gekk leiðin aftur til heimstaðin Leirvík, har hann nú býr saman við familjuni.

Berg er sera áhugaður í ítrótti, serliga fótbólti. Nú hann ikki spælir sjálvur, ger hann eitt stórt arbeiði í nevndini hjá LÍF, umframt at hann eisini hevur verið venjari hjá teimum ungu.

Við sínum lætta sinni hevur Berg stóran týdning fyri trivnaðin í fyritøkuni. Hann er altíð til reiðar at hjálpa, og við sínum dugnaskapi og arbeiðssemi hava bæði kundar og starvsfelagar stórt álit á Berg, til stóra gleði hjá fyritøkuni.

Berg er giftur við Karin Foldbo, ættað úr Leirvík. Tey eiga 3 børn: Sølvi, Arna og Gunnar.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin